# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*-Vit hava gjørt stór framstig og hava tikið tíggju fólk í sambandi við morðið á Onnu Politkovskaja*
*(russiskur ákæri).*

# Olympia slapp undan eldhavinum



*Um vikuskiftið hótti skógareldurin hótti við at breiða seg til søguliga staðið Olympia, men tað eydnaðist at forða tí*

**Tað eydnaðist um vikuskiftið griksku sløkkiliðunum at forða fyri, at skógareldarnir skuldu breiða seg til fornaldarstaðin Olympia**

Væl mannað sløkkilið við flogførum og tyrlum royna at basa skógareldunum á Peloponnes og aðrastaðni í Grikkalandi, men uppgávan tykist næstan óloysilig, skrivar Reuters úr Athen. Higartil hava minst 61 fólk latið lív í teimum ógvusligu eldunum, sum nú herja næstan helmingin av øllum landinum.

Um vikuskiftið var um reppi, at skógareldarnir breiddu seg til søguliga staðið Olympia, men tað eydnaðist sløkkiliðunum at forða tí í síðstu løtu. Tað var í Olympia, at teir fyrstu olympisku leikirnir vóru í árinum 776 fyri okkara tíðarrokning, og tað er har, tann olympiski kyndilin verður kveiktur annaðhvørt ár undan teimum olympisku summar- og vetrarleikunum.

Griksku myndugleikarnir hava illgruna um, at fleiri av skógareldunum kunnu vera ásettir, og borgarstjórin í Athen hevur sagt, at talan kann vera um yvirgang. Leygardeagin varð ein 65 ára gamal maður tikin og skuldsettur fyri at hava sett eld á nærhendis býnum Areopolis, og minst tíggju onnur fólk hava verið til avhoyringar.

Myndugleikarnir hava lýst undantaksstøðu, og 40 bygdir liggja oydnar, tí alt fólkið er flutt burtur haðani. Umleið 1.000 sløkkiliðsmenn, 425 hermenn og 16 flogfør umframt fleiri tyrlur royna at basa eldunum. Onnur evropeisk lond hava sent 13 flogfør og tyrlur at hjálpa grikska sløkkiliðunum.

# 2000 løgreglumenn umhugsa at siga upp

**Danskir løgreglumenn halda seg fáa ov lítið í løn, og tí umhugsa nógvir teirra at fáa sær annað arbeiði. Fleiri hava longu gjørt tað**



*Betri løn og betri arbeiðstíðir fáa danskar løgreglumenn til at leita sær annað arbeiði*

Brian Falk ein av løgreglumonnunum, sum hevur fingið sær annað arbeiði. Í tíggju ár var hann løgreglumaður, men í dag arbeiðir hann sum trygdarmaður hjá einum flutningsfelagi í Kolding. Tað hevur havt stóra týdning. Hann fær umleið 50 prosent meiri í løn, enn hann fekk í løgregluni, og arbeiðstíðin er munandi betri, skrivar Ritzau.

Formaðurin í danska løgreglumannafelagnum, Peter Ibsen, sigur við danska útvarpið, at hann hevur fingið teldubræv frá umleið 2.000 løgreglumonnum, sum umhugsa at siga upp og at fáa sær annað arbeiði. Vansarnir eru vorðnir ov mangir og lønin ov lítil, sigur hann og vísir á, at byrjanarlønin hjá einum ungum løgreglumanni er 21.000 krónur um mánaðin, og tá arbeiðir hann partvíst um náttina og í vikuskiftunum.

Sambært Peter Ibsen hava løgreglumenn ikki torført við at fáa annað arbeiði, og tað eru serliga fyritøkur innan trygging og trygd, sum vilja hava løgreglumenn í arbeiði, sigur hann.

## STUTT SAGT

### Bumba sivilfólk

Fólk í einum býi í afghanska Helmand-landspartinum vilja vera við, at bumbuflogfør hjá teimum útlendsku herdeildunum bumbaðu mál í býnum leygardagin, og at nógv sivilfólk, teirra millum fleiri børn, lótu lív. Amerikanska herleiðslan í Afghanistan váttaði í gjár, at samanbrestir gøvdu verið við býin Musa Qala, men avsannaði, at bumbuflogfør høvdu verið á flogi við býin. Afghanskar keldur søgdu, at umleið 60 sivilfólk høvdu latið lív í álopinum hjá teimum útlendsku herdeildunum, og at nógv hús eru oyðiløgd.

### Demokratisk revsing

Í USA hevur leiðslan í demokratiska flokkinum gjørt av, at valfelagið í statinum Florida fær onga ávirkan á, hvør verður valevni hjá flokkinum á forsetavalinum næsta ár. Orsøkin er, at valfelagið í Florida hevði gjørt av at flyta sín uppstillingardag, soleiðis at Florida skuldi verða ein av teimum fyrstu statunum til at taka støðu til, hvønn flokkurin skal stilla upp næsta ár. Men floksleiðslan sigur, at flokkurin fer at varðveita ta gomlu siðvenjuna við at lata teir smáu statirnar taka støðu fyrst. Avgerðin skal helst forða fyri, at aðrir stórir statir fáa sama hugskot sum Florida.

### Duga illa danskt

Børn hjá innflytarum tykjast hava stórar trupulleikar við at læra seg at tosa danskt, og tað tykist heldur ikki gera mun, at kommunurnar bjóða foreldrunum at senda børnini á serlig málskeið. Eitt nú vísir ein kanning í Århus, at 69 prosent av innflytarabørnunum hava brúk fyri hjálp at læra seg danskt. Í fjør vísti ein tilsvanandi kanning, at 62 prosent høvdu brúk fyri hjálp.